

# Bilmekanikari til Postverk Føroya

**Søkt verður eftir bilmekanikara til bilhópin hjá postverkinum.**

Starvið er sera avbjóðandi. Tú skalt taka tær av øllum viðlíkahaldi, bæði av bilum og prutlum, standa fyri keypi av bilum og eykalutum og gera íløgu- og útskiftingarætlanir fyri akførini.

Tú skalt kunna arbeiða sjálvstøðugt, taka avgerðir og ábyrgd, hava gott fíggjarligt innlit og evni at umstilla teg í einum broytiligum umhvørvi.

Fyri rætta persónin er starvið bæði spennandi og mennandi.

**Vit vænta, at tú ert**
- Álitandi
- Samstarvssinnað/-ur
- Jalig/-ur

**Vit vænta, at tú hevur**
- Útbúgving sum bilmekanikari
- Góðan teldukunnleika
- Hegni til umsitingarligar uppgávur

**Tú kannst vænta**
- Møguleika fyri menning
- Gott og framtakshugað umhvørvi
- At tín ávirkan ger mun

**Løn og setanarviðurskifti**
Starvið er lønt eftir sáttmála millum Starvsmannafelagið og Føroya Arbeiðsgevarafelag. Talan er um fulltíðarstarv, sum er 39 tímar um vikuna.

**Umsókn**
Umsókn við avriti av prógvum og ummælum skal sendast til:

Postverk Føroya
starvsfólkadeildin
Óðinshædd 2
100 Tórshavn
marry@postverk.fo

og vera okkum í hendi í seinasta lagi hin **16.02.09**

**Spurningar**
Spurningar um starvið kunnu setast Georg N. Rasmussen á tel. 236040 ella gera@postverk.fo

Stutt um Postverk Føroya
245 fólk starvast hjá P/F Postverki Føroya. Hin 1. januar 2005 varð postverkið umskipað frá almennum stovni til partafelag við Føroya Landsstýri sum eigara. Høvuðsskrivstovan, miðdepilin fyri alt virksemi felagsins, er á Óðinshædd í Tórshavn. Saman við samstarvsfelagum veitir Postverk Føroya bestu flutningstænastu og dygdarbestu viðgerð úti og heima.

Postverk Føroya
– okkara samskiftisfyritøka

post.fo



## Telefonbókin 2009

**Í mai 2009 verður telefonbókin borin út til allar fastnetstelefonfelagar í Føroyum. Verandi og nýggj virki, handlar og stovnar, sum vilja nýta møguleikan at lýsa á Gulu síðum, skulu boða frá hesum – bæði um talan er um nýggjar lýsingar, ella um hildið verður áfram við teimum verandi. Seinasta freist at lata inn broytingar til telefonbókina 2009 er fríggjadagin 7. februar 2009.**

FØROYA TELE

**Hvítu síður**
Fríggjadagin 7. februar 2009 er seinasta freist at koma við rættingum til Hvítu síður í telefonbókini 2009 (vanliga telefonyvirlitið). Rættingablað til Hvítu síður er á bls. 553 í telefonbókini 2008 og skal sendast til: Kundaskráseting, Føroya Tele, Postboks 27, FO-110 Tórshavn.
Til ber eisini at senda til faks 32 10 91 ella at ringja tel. 80 80 14.

**Eykaupptøkur o.a.**
Umframt rættingar til navn, bústað, telefonnummar o.a. kann ein eisini gera nakað serligt burtur úr telefonnummari sínum, t.d. við undirstrikingum, eykaupptøkum og/ella undirupptøkum. Prísurin er kr. 62,50 fyri hvørja undirstriking, eykaupptøku ella undirupptøku.

**Búmerki**
Til ber eisini at fáa búmerki í Hvítu síður. Prísurin fyri búmerki er kr. 2.500,00 fyri hvørja upptøku. Fyri búmerki í litum er prísurin kr. 3.750,00 fyri hvørja upptøku.

**Gulu síður**
Fríggjadagin 7. februar 2009 er seinasta freist at boða frá av nýggjum, um ein ynskir upptøku í Gulu síður.

**Prísir**

| | |
|---|---|
| (A) Standardlýsing | kr. 1125,00 |
| (B) Innramming | kr. 1.250,00 |
| (E) Grafisk lýsing, fyri mm (min. 30 mm) | kr. 37,50 |
| (Sí dømi á bls. 555 í telefonbókini 2008) | |

**Litlýsingar**
Umframt vanligar svart/gular lýsingar, ber eisini til at lýsa við hvítari bakgrund og við litum. Eykakostnaður fyri hvíta bakgrund er kr. 750,00. Eykakostnaður fyri litir við hvítari bakgrund er kr. 1.750,00. Skrásetingablað/rættingablað til Gulu síður er á bls. 554 í telefonbókini 2008 og skal sendast til: Føroya Tele, Postboks 27, FO-110 Tórshavn ella til faks 32 11 66.

Allir prísir eru við mvg.
tel. 80 80 14
www.ft.fo
www.nummar.fo
www.gulu.fo
tbok@ft.fo

SENDISTOVAN

FT Samskifti er dótturfelag í Føroya Tele. Í felagnum er øll kundarøkt, øll søla og alt samskifti við privatkundar og vinnukundar, alt GSM-samskifti og øll staðarútgerð til fastnettelefoni og breiðband. Í felagnum starvast gott hundrað fólk. Tænastur frá FT Samskifti verða marknaðarførdar undir navninum Føroya Tele.

FØROYA TELE